TILFEINGIS- OG
VINNUMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Fisheries, Industry and Trade

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3 Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 2. februar 2026
Málsnr.: 26/02255
Viðgjørt: DP

Svar upp á spurningar til landsstýrismannin í tilfeingis- og vinnumálum viðvíkjandi LM-066/2025: Uppskot til løgtingslóg um fyrireiking, prosjektering og útboð av Suðuroyartunlinum við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum

Fíggjarnevndin setir landsstýrismanninum í tilfeingis- og vinnumálum saman við Jarðfeingi hesar spurningar at svara skrivliga:

Upplýst er fyri nevndini, at jarðfrøðin á *Skarvanesleiðini* er nógv kannað, men at nú mælir Jarðfeingi til, at úti fyri Skarvaneslandinum eiga nakrar kanningar at gerast afturat í samband við faldirnar, sum eru staðfestir.

Spurningar:
1. Hvørjar kanningar verður mælt til at gera?

***Svar*:** Jarðfeingi hevur upplýst, at mælt verður til at gera fýra boringar fram við landsvegnum heima á Sandi og gera mátingar (logga) í holinum. Í tí sambandi verður hugt at jarðfrøðini nærhendis boringunum.

2. Hvussu langa tíð tekur hetta at gera?

***Svar*:** Jarðfeingi hevur upplýst, at mett verður, at tað tekur eina til tvær vikur (veldst um hvussu holini hátta seg) at gera mátingar í holunum og 2-3 dagar at hyggja at jarðfrøðini. Hetta verður gjørt samstundis. Síðani tekur tað áleið 8 vikur at lýsa holini.

3. Hvussu langa tíð tekur tað at viðgera dáturnar, áðrenn úrslitið fyriliggur?

Svar: Jarðfeingi hevur upplýst, at tað tekur eina til tvær vikur at taka saman um og skriva frágreiðing.

Samanumtikið kemur tað at taka umleið 3 mánaðir at gera neyðuga arbeiðið.

Upplýst er fyri nevndini, at á *Múlaleiðini* eru nógvar kanningar gjørdar, men at enn vanta nakrar.

Spurningar:
4. Hvørjar kanningar eiga at gerast afturat (á sjógvi og á landi)?

Svar: Jarðfeingi hevur upplýst, at
a. Á landi er tørvur á:

TILFEINGIS- OG
VINNUMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Fisheries, Industry and Trade

i. at kortleggja jarðfrøðina (feltarbeiði) heima á Sandi, á vestursíðuni av oynni og á Skúvoynni
ii. at gera magnetiskar mátingar somu stað.
iii. Gera eina kjarnaboring nærhendis tunnilsmunnanum norðanfyri Sands bygd. Kjarnin skal síðan lýsast, umframt at holið skal mátast (loggast).

b. Á sjónum er tørvur á:
i. At sigla fram við landi fyri at hyggja at rivum í økjum, har ikki varð siglt í sambandi við Skarvanesleiðina (vestursíðuni av Sandoynni og norður og vestursíðuni av Skúvoynni).
ii. Fylla tey hol, sum eru í multibeam data (dýpdardata) millum Sandoynna og Skúvoynna.
iii. Hyggjast skal nærri at seismiskum og multibeam data millum Sandoynna og Skúvoynna, og alt eftir, hvat tað førir við sær, kann tað verða tørvur á meir data so sum subbottom profiler (sediment skanningar) data.

5. Hvussu langa tíð tekur hetta at gera?

Svar: Jarðfeingi hevur upplýst, at

a. Kortlegging á landi og magnetiskar mátingar taka umleið 4 vikur at gera.
b. At sigla fram við landi verður gjørt uppá ein dag. At fáa myndirnar staðsettar í telduforriti og tulkaðar tekur væntandi umleið eina viku.
c. Boring nærhendis tunnilsmunnan tekur væntandi 1-2 dagar at logga. Tað tekur síðani umleið eina viku at lýsa kjarnan eftir, at hann er komin til Jarðfeingi.
d. Av tí at tað er óvist um tørvur er á at savna onnur data enn multibeam, og í so fall hvørji data, so ber ikki til í verandi støðu at meta um tíðina, sum hetta kann koma at taka.

6. Hvussu langa tíð tekur tað at viðgera dáturnar, áðrenn úrslitið fyriliggur?

Svar: Jarðfeingi hevur upplýst, at

a. Hvør data innsavnan verður viðgjørd so hvørt og er íroknað í tíðini til innsavnan, men eftir at alt er komið til høldar verða øll úrslit samansjóðaði til ein myndil fyri jarðfrøðina á tunnilslinjuni. Tað er í hesum sambandinum at ein tunnilsprofilur, sum vísur hvørja jarðfrøði tunnilin gongur ígjøgnum, og eitt kort við m.a. rivum, verður gjørt. Av tí at tunnilin frá suðurendanum av Skúvoynni og til Sandvíkar liggur nærhendis Skarvanesleiðini, so er mett at hetta arbeiðið kann náast uppá 4 til 8 vikur alt eftir kompleksitetinum av jarðfrøðini.

b. Eftir at endaligur myndil er gjørdur verður ein frágreiðing skrivað, sum lýsir data, arbeiðið og úrslit. Av tí at nógv av tilfarinum frá frágreiðingini til Skarvanesleiðina kann endurnýtast kann hetta gerast uppá 4-6 vikur.

TILFEINGIS- OG
VINNUMÁLARÁÐIÐ

Ministry of Fisheries, Industry and Trade

Í mun til ”Múlaleiðina” eru nakrar óvissur. Partvís er tað óvist, hvar hendan tunnilslinjan gongur. Í hesum svarinum er gingið út frá at tunnilin byrjar nakað norðanfyri Sands bygd og endar í Sandvík.

Aðrar óvissur eru í, at innsavnan av nýggjum multibeam data, umframt at neyvari lýsing av verandi data kann vísa á, at tørvur er á at savna onnur sløg av data, fyri at fáa nøktandi mynd av jarðfrøðini.

Um tað ikki er neyðugt at savna meir data enn tær omanfyri nevndu, so verður leysliga mett at samlaða tíðin, tað tekur Jarðfeingi at gera arbeiðið, sum krevst at framleiða eina jarðfrøðiliga samlifrágreiðing í stíl við hana, sum er gjørd til Skarvanesleiðina, kemur at liggja millum 4 og 6 mánar av effektivari arbeiðstíð.

Tá er hædd tikin fyri at uppgávur kunna loysast síðuleypandi, men ikki fyri tí tíðini, sum krevst fyri at fáa gjørt kanningar, sum Jarðfeingi ikki sjálvt ger, harímillum innsavnan av dýpdardata.